## Vága-vaktin

Henda mikudagin í farnu viku, arbeiddu tær báðar, Eyðbjørg Olsen og Hildigun Garðalíð, á teirri sonevndu "Vága-vaktini".
Hetta er ein vakt, har ein stórur partur av arbeiðsfólkunum koma úr Vágoynni. Ta vikuna møtti vaktin klokkan 8 og síðani til hús aftur klokkan 4. Í hesi vikuni arbeiða tær frá klokkan 4 til midnátt.
At vaktirnar soleiðis skifta hevur lítið at siga fyri tær báðar royndu flakakvinnurnar. Tær eru í roynd og veru glaðar um hetta.
- Tað er so deiligt at arbeiða í skiftandi vaktum, tí so fær ein gjørt ymisk ørindi fyrrapartin, tá ein skal til arbeiðis um kvøldið - til dømis fara til frisør, tannlækna og slíkt, siga tær báðar við einum brosi á kinn.



**Tað sum gjørdi tað heila meiri álvarsamt var, at tingmenninir, teir fingu sína løn, meðan hini máttu bíða**




**IKKI FREMMANT**

*62 ára gamla, Hildigun Garðalíð er ættað úr Klaksvík, og hevur arbeitt í fiski har, áðrenn hon giftist til Vestmanna og seinni fór at arbeiða í fiski her. – Hetta var ikki fremmant fyri mær, sigur hon*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Primitivt

Tey árini, ið tær báðar, Eyðbjørg og Hildigun hava arbeitt í føroysku flakavinnuni eru eisini stórar broytingar og rasjonaliseringar farnar fram.
Ein onnur sera týðandi broyting er tann effektiviseringin ið er hend hesi 33 og 22 árini. Tá var talið av arbeiðsfólkum nærum dupult so stórt sum í dag.
- Ja, tá var munur á. Alt var tyngri, tí alt skuldi bæði lyftast og berast við handamegi. Tað var sera primitivt, meðan tað í dag koyrir eftir einum transportbandi við teirri fúkandi ferð, vísa tær á.
- Arbeiðið er vorðið nógv lættari, men nú gongur tað eisini munandi skjótari, og nógv verður koyrt ígjøgnum á hvørji einastu vakt.